## UTTAN ÚR HEIMI

### Blað fingið risastórt endurgjaldskrav

Eitt meklarafelag í Bretlandi krevur, at blaðið Financial Times skal rinda felagnum 25 milliardir krónur í endurgjaldi.

Málið byrjaði við, at ein av starvsmonnunum hjá meklarafelagnum bleiv uppsagdur. Aftaná skuldsetti hann fyrrverandi arbeiðsgevaran fyri lógarbrot, og málið endaði í rættinum. Fleiri bløð, teirra millum Financial Times, gjørdu nógv burtur úr málinum, og nú vil meklarafelagið vera við, at umrøðan í Financial Times gjørdi, at partabrøvini í felagnum minkaðu 16 prosent í virði.

Fyrrverandi starvsmaðurin tapti rættarmálið ímóti meklarafelagnum, men leiðslan í Financial Times heldur ikki, at blaðið bar seg skeivt at. Richard Spearman, sum er sakførari hjá meklarafelagnum, vísir hinvegin á, at Financial Times er eitt høgt mett blað í fíggjarheiminum, og at innihaldið í blaðnum tí hevur stóra ávirkan.

Vinnur meklarafelagið sakarmálið um tað ovurstóra endurgjaldskravið, fer tað helst at hava við sær, at Financial Times fer í søguna. Men tað fær eisini aðrar avleiðingar, vænta eygleiðarar í London, tí teir stúra fyri, at tað verður endin á allari neyvari blaðskriving um fíggjarheimin.

Financial Times hevur biðið rættin vísa endurgjaldskravinum frá sær, og tann avgerðin fellur síðst í hesari vikuni. Vísir rætturin ikki málinum burtur, skal tað viðgerast næsta ár.

### Skulu steinast til deyða

Teir sonevndu sharia-dómstólarnir í Nigeria hava dømt tvær kvinnur at verða steinaðar til deyða, tí tær hava verið monnum sínum ótrúgvar.

Í síðstu bviku bleiv tann 29 ára gamla Hajara Ibrahim dømd at verða steinað til deyða, eftir at hon hevði viðgingið, at hon hevði havt samlegu við einum øðrum manni. Kvinnan er við barn, og rætturin avgjørdi, at hon skal steinast til deyða, tá hon hevur átt barnið. Maðurin, sum hon hevði havt samlegu við, bleiv fríkendur, tí rætturin segði seg ikki hava nakað prógv fyri, at hann var tann seki.

Miðskeiðis í september gjørdi ein annar dómstólur av, at tann 26 ára gamla Daso Adamu skal fáa somu revsing. Hon varð dømd til deyða, tí hon hevði verið manni sínum ótrúgv seks ferðir. Eisini í hesum málinum bleiv maðurin, sum hon hevði verið saman við uttan fyri hjúnalagið, fríkendur, tí prógvini vóru ikki nóg góð.

Fyri fýra árum síðani samtyktu myndugleikarnir í nigeriska landspartinum Bauchi at seta tær islamsku sharia-lógirnar í gildi aftur. Fleiri kvinur eru síðani dømdar at verða steinaðar til deyða, men higartil eru dómarnir ikki fullførdir, tí hægri dómstólar hava veitt teimum dømdu kvinnunum grið.

### Kendir menn vóru uppi í kvettætlan

Fyrr í ár tóku myndugleikarnir í Zimbabwe 70 leiguhermenn, sum vóru á veg til Ekvator-Guinea, og tað varð skjótt greitt, at menninir vóru sendir hagar at taka valdið frá einaræðisharranum Teodoro Obiang.

Zimbabwisku myndugleikarnir hildu uppá, at onkur hevði sent leiguhermenninar og goldið teimum pengar afturfyri. Nú hevur bretska blaðið Evening Standard avdúkað, at Mark Thatcher, sonur fyrrverandi bretska forsætisráðharran Margareth Thatcher, og tann kendi bretski rithøvundurin Jeffrey Archer vóru tveir av monnunum aftan fyri kvettætlanina.

Ein suðurafrikanskur flogskipari hevur viðgingið, at hann fekk 250.000 dollarar frá Mark Thatcher, so hann kundi útvega leiguhermonnunum eitt flogfar. Eisini er avdúkað, at Jeffrey Archer rindaði oddamanninum hjá leiguhermonnunum 74.000 dollarar.

Mark Thatcher varð herfyri tikin í Suðurafrika, og hann kann fáa 15 ára fongsul, verður han funnin sekur.



*Hesar palestinsku genturnar eru á veg úr skúlanum. Iman el Hamas varð skotin, tá hon var á veg í skúla*

*Mynd: Reuters*

# Ísraelskur heryvirmaður gjøgnumgataði deyða palestinska smágentu

**Tann 13 ára gamla Iman el Hamas doyði, tá ísraelskir hermenn skutu hana. Men tað var ikki nóg mikið, helt yvirmaður teirra**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska herleiðslan er farin undir at kanna ein tilburð, tá ein 13 ára gomul palestinsk genta doyði av kúlum frá ísraelskum hermonnum.

Málið er komið fram, tí fleiri menn í ísraelsku herdeildini hava skuldsett ovasta teirra fyri at hava skotið gentuna fleiri ferðir, eftir at hon var deyð av kúlum frá øðrum hermonnum. Hermenninir, sum sóu tilburðin, krevja, at yvirmaðurin verður revsaður, og teir sýta fyri at gera tænastu í deildini, verður yvirmaðurin ikki koyrdur frá.

Tann 13 ára gamla Iman el Hamas var á veg í skúla ein dagin í síðstu viku. Tá hon fór fram við einari ísraelskari vaktarstøð, skutu hermenninir hana. Lítla løtu seinni fór yvirmaðurin yvir til líkið av gentuni og skjeyt hana fleiri ferðir afturat. Læknarnir, sum kannaðu líkið, funnu meiri enn 20 kúlur, skrivar Reuter.

– Tá vit fingu eyga á gentuna, var hon einar 70 metrar frá okkum. Tá hon fór at renna, skutu nakrir av hermonnunum eftir henni. Hon doyði beinanvegin. Yvirmaður okkara fór yvir hagar, líkið lá, og sjálvt um fleiri okkara mótmæltu, skjeyt hann hana fleiri ferðir afturat. Hann hevur vanærað umdømi okkara, og vit vilja ikki gera tænastu undir honum longur, sigur ein av hermonnunum sambært blaðnum The Guardian.

Ísraelska herleiðslan hevur kunngjørt, at málið vrður kannað, men herleiðslan sigur, at enn er ov tíðliga at siga, um yvirmaðurin verður ákærdur.

# Blóðugar veiðimyndir skelka umheimin

**Norski fiskimálaráðharrin ætlar at loyva útlendskum ferðafólki at veiða kóp í Noregi, men tað er ikki fallið í góða jørð uttanlands**

FERÐAVINNA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fjølmiðlar í Evropa hava verið á gosi seinastu tíðina, eftir at norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, kom við einum uppskoti um at lata útlendsk ferðafólk sleppa at veiða kóp. Ráðharrin helt, at kópaveiða kundi gerast eitt gott ískoyti hjá norsku ferðavinnuni.

Uttanlands hevur uppskotið vakt stóran ans, og næstan dagliga hava fjølmiðlar viðgjørt málið. Seinast var týskvøldið, tá niðurlendska sjónvarpið vísti nakrar upptøkur frá kópaveiði í Noregi. Har vísti ein norðmaður hyggjarunum, hvussu ein eigur at taka lívið av einum kópi. Myndirnar vóru sera blóðugar, og sambært norskum fjølmiðlum legði myndamaðurin seg eftir at fáa nærmyndir av sjálvum drápinum.

Tað eru heldur ikki allir norðmenn, sum eru so fegnir um uppskotið hjá fiskimálaráðharranum. Jens Fredrik von der Lippe, sum er ferðavinnustjóri í Tróndheimi, sigur við blaðið VG, at uppskotið hjá ráðharranum fer at koma norsku ferðavinnuni aftur um brekku.

– Kópaveiði og hvalaveiði hava fyrr givið okkum ringa umtalu uttanlands, og sjálvandi hendir tað sama nú. Eg stúri fyri at fara á ferðavinnustevnur uttanlands at greiða fólki frá, at tey eiga at fara til Noregs at halda frí, sigur ferðavinnustjórin í Tróndheimi, sum vit hava Svein Ludvigsen at taka uppskotið aftur sum skjótast.

Men fyribils er einki, sum bendir á, at uppskotið verður tikið aftur. Jorhill Andreassen, sum er politiskur ráðgevi í fiskimálaráðnum, sigur við VG, at talan er ikki at loyva størri kópaveiði enn nú, og harafturat sleppa útlendingar ikki at veiða kóp, fyrr enn teir hava nomið sær sama førleika, sum norskir veiðimenn skulu hava.




## Skeið innan trivnað og umhvørvi á arbeiðsplássinum

Serfrøðingar frá CRECEA (fyrrv. BST) vóru í Føroyum í juni og hildu seminar innan fleiri av hesum skeiðum, ið vit fara at bjóða nú í novembur. Nógv fólk nýttu høvið at hoyra teir, og eftirmetingarnar vóru ógvuliga góðar.

### Temadagur: Heilsubetran á arbeiðsplássinum

***Skrá:***
08:30-08:45 - Vælkoma og innleiðing
08:45-09:30 - Hvat er heilsa? Hví hugsa um heilsu?
09:30-12:00 - Luttakararnir verða býttir upp í 3 lið, ið skiftast um at nýta 40 min uppá:
- Heilsuprofil, mátingar
- Massagu/zoneterapi + kostvegleiðing
- Handfaring av strongd

12:00-13:00 - Ábit - verður presenterað av kostvegleiðaranum
13:00-14:30 - Tey 3 liðini halda áfram við aktivitetum og skiftast um at nýta ein hálvan tíma uppá:
- Individuellar samrøður um heilsuprofil
- Starvsfólkasamrøður
- Autogenar venjingar

14:30-14:45 - Kaffebuffét
14:45-15:30 - Faktorar í heilsubetran í fyritøkuni: Hvussu verður hetta sett í verk? Evaluering og spurningar?

**Møguleiki verður fyri at taka konditest og at máta kolesterol, blóðsukur og blóðtrýst.**

***Skeiðleiðarar:***
Crecea Århus konsulentar, Sam Jakobsen, sjúkrarøktarfrøðingur, massørar/zoneterapeutar, avspenningspedagogur, sálarfrøðingur og kostvegleiðari.

**Dagar: 10. nov, kl. 09:00 - 16:00**



### Onnur skeið innan trivnað og arbeiðsumhvørvi:

**Sjúkrafrávera - spill av góðum kreftum**
8. og 9. nov, kl. 09:00 - 16:00
**At skilja og loysa konfliktir**
9. nov, kl. 09:00 - 16:00
**Psykiskt arbeiðsumhvørvi og organisatiónsmenning**
10. og 11. nov, kl. 09:00 - 16:00
**Ergonomiskt og psykiskt arbeiðsumhvørvi**
11. og 12. nov, kl. 09:00 - 16:00

Skeiðlýsingar fyri hesi skeið eru at finna á heimasíðu okkara á www.kvasir.fo.
Vit veita eisini serlig tilboð til stovnar og fyritøkur. Tit eru vælkomin at seta tykkum í samband við okkum um hetta. Vit bjóða okkum eisini til at koma út til tykkara at greiða meira frá hesum skeiðum.

KVASIR
**Tel 320 204 - www.kvasir.fo - kvasir@farodane.fo**



HE STMÓTIN Í HANDILSKJARNA UM



TIL HENNARA
vestur 369,95
blus 99,95
buksur 149,95
skógvar 569,95



TIL HANSARA
t-shirt 119,95
cardigan 649,95
belti 299,95
buksur 649,95
skógvar 499,95



TIL DRONG
0-2 ár
blusa 119,95
fleecejakki 229,95
buksur 199,95
skógvar 129,95

TIL GENTU
0-2 ár
blusa 99,95
fleecejakki 229,95
buksur 199,95
skógvar 129,95



Handilskjarnin P/F
N. Finsensgøta 8 · Boks 1350 · FO-110 Tórshavn
Tel 317919 · Fax 317930 · www.handilskjarnin.fo